

## Bjartskygni hjá OECD

Altjóða búskapar- og menningarfelagsskapurin OECD væntar, at búskaparvøksturin í Danmark næsta ár verður 1,3 prosent og 1,8 prosent í 2011. Kortini fer arbeiðsloysið framhaldandi at økjast næsta ár. Forsøgnin er betri enn tann seinasta, sum OECD kom við, tí sambært henni væntaði OECD ongan vøkstur í Danmark í 2010. Um Ísland sigur OECD, at frá einari minking næsta ár upp á 2,1 prosent fer íslendski búskapurin at hava 2,6 prosent í framgongd ella vøkstri í 2011. Um íslendska arbeiðsloysið sigur OECD, at tað verður 7 prosent næsta ár og 6,4 prosent í 2011.

## Biskupur á veðurráðstevnu

Tann 13. desember verður ein serlig guðstænasta í Kerypmannahavn í sambandi við ST-veðurlagsráðstevnuna, og har verður Grønland rættiliga væl umboðað. Millum annað skal grønlendski biskupurin, Sofie Petersen, lesa eina bøn, og grønlendska kórið Aavaat fer at syngja. Guðtænastan 13. desember verður í Københavns Domkirke, og har fer tann kendei suðurafrikanski biskupurin Desmond Tutu at prædika. Í sambandi við guðstænastuna fara kirkjuklokkurnar í londum um allan heimin at ringja, og Sofie Petersen hevur sagt seg vóna, at allar kirkjurnar í Grønlandi fara at ringja hendan dagin.

# Ørt í høvdinum at fáa útlendingar til Føroya

**Ingeborg Vinther skilir ikki, hvussu politikarar og vinnulívsfólk framvegis royna at fáa útlendska arbeiðsmegi til landið**

ARBEIÐSLOYSIÐ
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Tað er púra ørt, tá ið bæði politikarar og vinnulívsfólk framvegis tosa um at fáa útlendska arbeiðsmegi til Føroyar.

Tað heldur Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag.

Hon sipar til grein í Sosialinum i gjár og hina greinina her á síðuni, har víst verður á, at eini 80-90% av øllum teimum arbeiðsleysu eru tímalønt arbeiðsfólk.

– Samstundis vita vit, at so at siga øll útlendsk arbeiðsmegi, sum kemur til Føroya, er tímalønt arbeiðsmegi sum kemur higar í beinleiðis kapping við okkara egnu tímaløntu arbeiðsmegi.






*Hendan talvan yvir arbeiðsloysi í Føroyum kemur dátt við hjá Ingeborg Vinther, forkvinnu í Føroya Arbeiðarafelag. Hon vísir, at 80-90% av teimum arbeiðsleysu eru ólærd verkafólk og tí sigur hon, at tað er at reingja veruleikan at tvíhalda um, at tað er tørvur á útlendskari arbeiðsmegi í Føroyum*

Men útlendska arbeiðsmegin hevur so tann fyrimunin, at fyri at fáa hana til landið, skal arbeiðsgevarin binda seg til at tryggja henni fulla arbeiðsviku.

– Tað trygdina hevur føroyska verkafólkið ikki og tí er tað ein sannroynd, at tá ið arbeiðið minkar, verða arbeiðsgevarar tvingaðir at taka útlendsku arbeiðsmegina framum og lata føroyingarnar sita heima.

Ingeborg Vinther sigur, at hetta er nakað, sum arbeiðsgevararnir sjálvir vátta.

Forkvinnan í Føroya Arbeiðarafelag heldur, at tað hevði neyvan verið góðtikið, skuldi tað hent, at tað var útbúgvin arbeiðsmegi, sum kom higar og tók arbeiðið frá føroyingum á skrivstovum, almennum stovnum og aðrastaðni.

– Men tá ið talan er um tey tímaløntu, tykist sum um at hetta verður góðtikið, leggur hon speiskliga afturat.

Hon gevur heldur ikki nógv fyri páhaldið um, at tað er neyðugt at fáa útlendska arbeiðsmegi til landið, tí føroyingar tíma ikki at arbeiða á flakavirki.

– Hetta er ikki rætt. Men stóri trupulleikin er, at arbeiðið er so óstøðugt. Tí verður tað neyðugt at fáa fiskafólki ein fastlønarsáttmála og at tryggja teimum eina støðuga inntøku.

Ingeborg Vinther sigur, at hetta verður eitt høvuðsmál á næstu sáttmálasamráðingunum og eydnast tað, fer tað heldur ikki at standa á at manna flakavirkini við føroyskari arbeiðsmegi.

# Samgongan ført hundraðtals arbeiðsfólk fólk í arbeiðsloysi

**Stóri trupulleikin er, at vakstrarpakkin, sum samgongan skuldi koma við á ólavsøku, bleiv ístaðin ein sparipakki, sum hevur ført hundraðtals fólk í arbeiðsloysi**

ARBEIÐSLOYSI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Samgongan skuldi koma við einum vakstrapakka, sum skuldi fáa hjólini at mala. Men ístaðin fyri kom hon við einum sparipakka, sum hevur fingið hjólini at steðga.

Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya Arbeiðarafelagi, øtaðist við tá ið hon sá veruleikan í eyguni.

Og veruleikin er at av teimum 1300 fólkunum, sum eru arbeiðsleys, eru heili 80-90% ólærd verkafólk.

– Av teimum 1300 arbeiðsleysu, eru eini 1100-1200 ólærd verkafólk staðfestir Ingeborg vinther, akkurát soleiðis sum vit vístu á í Sosialinum í gjár.

Og hon gevur fyri ein stóran part samgonguni skyldina.

Nú tað seig saman um fíggjarliga, og arbeiðið í privatu vinnuni fór at minka av álvara, hevði forkvinnan í Føroya Arbeiðarafelag sett sítt álit á, at samgongan fór at føra ein stimbrandi politikki, sum kundi hildið hjólini malandi og arbeiðsloysinum frá hurðini.

Hon ásannar eisini, at vónirnar minkaðu ikki, tá ið samgongan kunngjørdi, at hon skuldi leggja ein vakstrarpakka fram á ólavsøku.

– Men vakstrarpakkin bleiv eitt satt vónbrot, tí hann hevur ikki ført nógv arbeiðsskapandi við sær, sigur Ingeborg Vinther.

Hon sigur at avleiðingin er, at samstundis sum privata vinnan repar seglini so tað munar, hevur tað almenna samstundis táttað í so at fólk í hópatali eru uppsøgd, bæði á stovnunum undir landinum og hjá kommununum.

Og hon staðfestir eisini, at tey uppsøgdu eru at kalla bara tímalønt arbeiðsfólk, helst tí at tey eru lættari at sleppa av við.

Samgongan hevur altíð vart seg við, at fleiri arbeiðsskapandi tiltøk eru sett í verk, ikki minst fyri byggivinnuna. Eitt nú er íløgukarmurin hækkaður næstan 100 milliónir fyri at leggja upp fyri minkingina hjá kommununum.

Men talan er um eitt tvíeggjað svørð, tí hallið á fíggjarlógini er 800 milliónir og tað er rætt og slætt neyðugt at fáa tað burtur eftir nøkrum árum og tí ver eisini neyðugt at tálma útreiðslunumø



*Hendan talvan, sum Samtak hevur gjørt eftir upplýsingum frá Eurostat, vísir, at arbeiðsloysi í Føroyum er lágt, samanborið við onnur lond. Men arbeiðsloysi hevur rakt ólærda verkafólkið hart, tí næstan øll tey arbeiðsleysu eru tímalønt*